# Lort í býin við Meylu og Knøtti

**Í gjár vóru Meyla og Knøttur á pallinum í Norðurlandahúsinum, sjálvt um Meyla hevði ilt við at trúgva, at nakað fyri børn er á skránni har**

FAMILJUTILTAK
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*





Meyla og Knøttur byrjaðu við at syngja Strok sangin, og tað var hóskandi, tí showið var eitt hátíðarhald av 50 ára føðingardagin hjá Stroki, sum upprunaliga æt Barnablaðið.

Síðan fór Meyla út og fann sítt pláss millum áskoðararnar, men ein maður sum æt Jóhan hevði sett seg í hennara stól, so hon setti seg bara á knøini hjá honum.

Meyla helt ikki, at tað kundi passa, at hon skuldi á pall í Norðurlandahúsinum, tí har plagar bara at vera opera og symfoniorkestur, og í øllum førum ikki nakað fyri børn.

Knøttur fekk tíbetur sannført hana um, at í dag var ”Lort í býin” á skránni. Tey sungu allar teirra sangir, sum eru kendir frá útvarpinum og ymiskum tiltøkum, har tey bæði hava luttikið í summar.

Nógv fólk vóru á pallinum og hjálptu Meylu og Knøtti. Har vóru tríggjar dansigentur, reiðskapsfimleikarar úr Havnar Fimleikafelagi og eisini nakrir av vaksnu áskoðarunum sluppu upp á pallin at hjálpa til. Harafturat sang dreingjakórið úr musikkskúlanum í Havn, millum annað sangin um Lummalykta Óla. Og punkbólkurin The Dreams framførdi løgini Sasa sa sa og Sjeikurin.

Showið var eitt bland av sjónleiki, sangi, fimleiki, dansi, ljóði og ljósi. Og børnini sótu uttast á stólinum og sóu út til at hugna sær.

Síðsti sangurin var Føðingardagssangurin, og meðan øll, ið høvdu luttikið komu inn á pallin, dalaðu reyðar, bláar og hvítar ballónir niður av loftinum.

– Komi og fái tykkum ballónir, rópti Knøttur til børnini, og tey vóru ikki sein, at gera sum hann bað tey.

Fleiri myndir frá »Lort í býin« í Sosialinum í morgin.

STARVSLÝSING

## Verkfrøðingur til vegadeildina

**Søkt verður eftir verkfrøðingi til vegadeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast. Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.**

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum tú í høvuðsheitum skal røkja og standa fyri:

· Planlegging
· Programmeringar, forkanningar, prosjektgransking av tunnils- og brúgvaprosjektum
· Byggja upp og standa fyri eini rakstrar- og viðlíkahaldsskipan av tunlum og brúm
· Skipa og leggja til rættis haldið av tunlum og brúm
· Luttaka í norðurlendskum samstarvi innan økið
· Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi við royndum ella áhuga innan omanfyri nevndu virkisøki.

Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, so sum góð samstarvsevni, at tú dugir at skipa títt arbeiðsøki, er førur fyri at eggja og ganga undan, er miðvísur og kann geva títt íkast til menning av arbeiðsplássinum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmálanum ímillum Fíggjarmálaráðið og Verkfrøðingafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn.

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. oktober, 2006. Merk brævbjálvan “Verkfrøðingur vegadeildin”, og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heina Eysturoy, deildarleiðara á vegadeildini, á fartel. 540 881, teldupostur he@lv.fo

**Landsverk** er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

STARVSLÝSING

## Húsavørður til Landsverk

**Søkt verður eftir einum húsavørði hálva tíð at byrja skjótast til ber.**

**Arbeiðsuppgávur**
Sum húsavørður fært tú ábyrgdina av:

· Innan- og uttandurða viðlíkahaldi og umsjón
· Umsjón og røkt av stovnsins bilum á skrivstovuni í Havn

Annars at hjálpa til við vørumóttøku og øðrum fyrifallandi arbeiði.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir fólki við handverkaraútbúgving ella líknandi. Koyrikort til lastbil er ein fyrimunur.

Vit leggja stóran dent á góðar persónligar eginleikar, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, er fyrikomandi, nærlagdur og álítandi.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvið er tímalønt.

**Umsóknir**
Umsókn við viðmælum verður at senda til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn.

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. oktober, 2006. Merk umsóknina “Umsókn Húsavørður”, og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fanny M. Petersen, starvsfólkaleiðara, á fartel. 540 811 ella fmp@lv.fo

**Landsverk** er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land